Páll Didriksen sendi B68 í oddin við tveimum málum

Bólkur 3: Við tveimum góðum málum í oddadystinum móti ÍF, sendi álopsspælarin Páll Didriksen, B68 fram í oddin í bólki 3. NSÍ vann sín dyst móti Royn, og nú er rættiligur spenningur í bólkinum, um hvørji lið sleppa víðari til kvartfinalurnar

EYÐUN KLAKKSTEIN

Bólkur 3 í kappingini um Løgmanssteypið er nú vorðin tann mest spennandi bólkurin. Tey trý Eysturoyarliðini, B68, NSÍ og ÍF stríðast um tvey pláss í kvartfinalunum, sum verða spældar mitt í mai mánað, og tey tvey umførini, sum eftir eru, fara at avgera hvørji lið sleppa víðari.

Toftamenn hava góðar fortreytir undan endabrestinum í bólkaspælinum, og teir hava ið hvussu er vissa sær at koma víðari til kvartfinalurnar. Spurningurin er um tað verður sum bólkavinnari ella 2'ari.

Dysturin stendur sostatt millum ÍF og NSÍ, og júst hesi liðini hittast í seinasta umfari, tá runavíkingar skulu til Fuglafirðar at spæla móti uppflytarunum í 1. deild.

B68-ÍF 2-1 (2-0)

Dysturin millum báðar oddafiskarnar í bólki 3 gjørdist ikki serliga vælspældur í ringu likindunum á Svangaskarði leygardagin.

Vindur og regn settu ein stoppara fyri tí flótandi og undirhaldandi fótbóltsspælinum, men tað vóru trý stig og eitt oddapláss í bólkinum at dystast um, og tað var motivatiónsfaktorurin undan og undir dystinum.

Í fyrra hálvleiki hevði B68 vindin í baki, og teir klárøðu eisini at trýsta ÍF aftur á vøllin. Men toftamenn komu sjáldan til málmøguleikar, og tey mongu langskotini, sum B68'arnir roynda seg við í undanvindinum, fóru fram við málinum ella endaðu í føvninginum á málverjanum hjá ÍF, Erlingi Joensen.

Tvær reisur fekk ágangandi og skjóti álopsspælarin hjá B68, Páll Didriksen, møguleika at gera mál, og báðu ferð prógvaði hann, hví hann er topskjúttin hjá toftamonnum.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki misti ÍF bóltin frammi á vøllinum, og í einari knappari vending spældi Súni Fríði Johannesen Páll Didriksen leysan (Súni Fríði og Páll vístu fleiri ferðir gott samanspæl). Páll dró móti málinum, og tá Erling Joensen kom út ímóti, smekkaði Páll til, og bóltin sat undir nettakinum. Sera gott avgreitt av runavíkinginum í B68.

5 minuttir seinni kiksaði ein rangstøðufella hjá fulgfirðingum, og Páll Didriksen gjørdist leysur mitt fyri. Páll lyfti bóltin upp um Erling og so var 2-0 til B68.

Í seinna hálvleiki hevði ÍF undanvind, og hetta gav liðnum onkrar møguleikar. Fyrra umfarið hevði Símun Eliasen besta kjansin, tá støðan var 2-0 til B68, men hann misnýtti tilboði.

ÍF fekk sítt mál eftir eitt væl gjøgnumspælt álop miðskeiðis í seinna hálvleiki. Bóltin varð spældur ígjøgnum í høgru, og Eyðálvur Petersen sendi ein harðan og flatan bólt innfyri málið. Har var Roy Róin fyrstur á og minkaði til 2-1.

Eftir hetta vóru ikki teir stóru møguleikarnir til ÍF, men í seinastu løtu, vann Símun Eliasen eitt innlegg úr høgru, og stútaði hart og gott uppá mál, men Kjartan Nesá bjargaði væl seinastu royndini hjá fulgfirðingum.

NSÍ-Royn 5-1 (2-0)

Tað gekk soleiðis sum væntast kundi, tá 2. deildarliðið NSÍ tók ímóti 3. deildarliðnum Royn í Runavík sunnudagin.

NSÍ var nógv betri, og gjøgnum dystin høvdu NSÍ'arnir málkjansir til ið hvussu er tað tvífalda talið av málum, sum teir fingu.

Royn royndi fyrst og fremst at verja fyri álopssinnaða NSÍ-spælinum, og hóast NSÍ eisini royndi at lokka hvalbingar longur fram á vøllin, fyri at betri pláss síðani skuldi vera á Royn-hálvuni, eydnaðist hetta ikki.

Fyrra umfarið fekk NSÍ tvey mál. Fyrst skoraði Sjúrður Jacobsen eftir innlegg frá Jónstein Petersen í vinstru, og síðani økti stoppararin Dánial Hansen til 2-0. Hann kom fram við til horna, og bólturin úr høgru frá Sjúrði Jacobsen, endaði við afturu stong, har Dánial var staddur, og hann avgreiddi til 2-0.

Ein part av fyrra hálvleiki hevði NSÍ trupulleikar við at bróta ígjøgnum væl mannaðu Royn-verjuna, og tá bólturin ikki varð fluttur nóg skjótt millum spælararnar var lítil broddur ofta í royndunum.

Í seinna hálvleiki løgdu runavíkingar størri orku í at flyta bóltin skjótt millum sín, og tað gav eisini betri úrslit. Kjansirnir vórðu fleiri, men tá knípti nakað við avslutningunum.

Eddie Mikkelsen legði NSÍ á odda 3-0, tá ein bóltur varð stungin til hansara í Royn-brotsteiginum. Hann høgdi til og bólturin streyk í málið.

Royn minkaði til 3-1, tá verjuspælararnir hjá NSÍ ikki fingu fatur á einum høgum bólti. Har var Tóroddur Niclasen og hann sendi bóltin í NSÍ-málið.

Innskifti Óli Hansen fekk meira brodd í NSÍ-spælið, og hann stóð eisini fyri málinum til 4-1. Hann fekk ein flatan bólt úr høgru síðu frá Kára Hansen, og hann setti fótin á bóltin, sum fór inn við stólpan.

10 minuttir fyri leiklok var punktumið sett, eftir eitt uppspæl í vinstru. Jónstein sendi innfyri málið, Óli royndi seg við skoti, men Royn-málverjin bjargaði. Eddie fylgdi upp og gjørdi tað til endaliga úrslitið 5-1 til NSÍ.

B68-Royn 3-0 (1-0)

Toftamenn høvdu ikki lætt við at bróta ígjøgnum verjuna hjá Royn, tí hvalbingar høvdu allar sínar menn afturi á vølinum, og fremsti maðurin var væl aftanfyri miðjuna. Í fyrra hálvleiki førdi hetta við sær at Kjartan Nesá í B68 bókstaviliga talt einki hevði at gera, og í seinna hálvleiki, tá Royn hevði undanvind, var tað eitt einstakt skot, sum Kjartan skuldi taka sær av.

Arnbjørn Danielsen, sum hesaferð var við frá byrjan, legði B68 á odda tá knapt korter var farið av dystinum. Við vinstrabeini sendi hann eitt hornaspark úr høgru beinleiðis í Roynmálið. Hann fekk helst nakað av hjálp frá vindinum, men málið taldi við fyri tað.

Restina av fyrra hálvleiki royndi B68 at koma ígjøgnum og til kjansir, men tað gjørdist trupult, tí Roynspælararnir kempaðu væl í verjuni, og løgdu alla orku í at sleppa so snikkaleysir sum gjørligt av aftur Svangaskarði.

B68 spældi nógv uppeftir miðásini, og tað var ikki tað skilabesta, tí ikki minst har var Royn vælmannað. Men tað var trupult at senda bóltarnar út í síðurnar, tí veðrið var vánaligt, og haraftur manglaði spælfordeilarin hjá liðnum, Abraham Hansen, sum hevði givið avboð vegna ein skaða í lærkreppinginum.

Stutt fyri hálvleik økti Páll Didriksen til 2-0, tá hann fylgdi einum skotið, sum Royn-málverjin (spældi annars væl, og hevði fleiri góðar bjargingar) ikki fekk hildið.

Í seinna hálvleiki kom eitt mál, og var tað nýggi maðurin á liðnum, Hans Hansen, um gjørdi tað. Hann kom við, tá Abraham gav avboð.

Eftir tvær royndir fekk Hans bóltin um málinjuna og so var 3-0 til B68.

B68 økti við sigrinum leiðsluna í bólki 3, og teir hava nú tryggja sær pláss í kvartfinalunum.



Súni Fríði Johannesen og Páll Didriksen hava gott samanspæl í B68-álopinum

HB til Sands og B36 til Klaksvíkar

Myndin gerst alsamt týðuligari um hvør skal spæla móti hvørjum í kvartfinalunum

EYÐUN KLAKKSTEIN

Sum vit skrivaðu í blaðnum seinasta týsdag, so varð tað undan bólkaspælinum avgjørt, hvussu liðini skulu hittast í kvartfinalunum.

Allir bólkavinnararnir fáa heimadyst móti einum 2'ara í part, og onkrar av kvartfinalunum eru farnar at mynda seg.

Fyrsta kvartfinalan verður millum vinnaran av bólki 2 og nummar 2 í bólki 3. Tað er eingin ivi um, at GÍ vinnur bólk 2, men meira ivasamt er, hvør verður nummar 2 í bólki 3.

Í bólki 3 er nevniliga hørð kapping um hetta plássið. B68 liggur sum er væl á odda í bólkinum, og vinnur mest sannlíkt bólkin.

Hinvegin stríðast ÍF og NSÍ íðiliga um annað plássið, og dysturin millum tey bæði liðini Dýra Biðidag fer helst at avgera hvør skal møta føroyameistarunum í Gøtu.

Vinnarin av bólki 3 skal spæla móti nummar 2 í bólki 2. Í løtuni sær hetta út til at fara at gerast ein dystur millum B68 og VB.

B68 er væl á odda í bólki 3, og VB verður helst stinnari enn FS Vágar í stríðnum um 2. plássið, FS Vágar og VB skulu hittast, men tað skal gangast illa hjá VB, koma teir ikki víðari.

Vinnarin av bólki 1 skal spæla móti nummar 2 í bólki 4. Í bólki 1 liggur B71 á odda í løtuni, men teir kunnu ikki kenna seg tryggar, tí B36'arnir eru naskir, og koma til Sands leygardagin eftir øllum stigunum. Í bólki 4 er HB nummar 2 ájavnt við Sumba, men har er lítið at ivast í at tað verður havnaliðið, sum sleppur víðari.

Í bólki 4 er KÍ klárt á odda, og um teir klára at fáa eitt stig afturat í bólkaspælinum, so vinna teir bólkinum. Í kvartfinaluni skulu teir so møta nummar 2 í bólki 1, sum í løtuni er B36, men tað kann gerast til B71, um B36 fær nakað burtur úr dystinum á Sandi leygardagin